Heilsumálaráðið

Dagfesting: 29.09.2023
Mál nr.: 23/18533-21
Málsviðgjørt: GMM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 18. Støddin á tilskotum er ásett eftir tilskotsprísunum sambært § 21 til heilivág o.a., sum veittur verður sambært §§ 13- 17, og sum viðkomandi persónur hevur keypt innan fyri eitt ár frá fyrsta keypi. Eitt nýtt tíðarskeið byrjar, tá viðkomandi persónur aftur keypir tilskotsheimilaðan heilivág, eftir at gamla tíðarskeiðið er farið. *Stk. 2.* Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár undir 500 kr., verður einki tilskot veitt. *Stk. 3.* [2)] [3)] [4)] [7)] Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár yvir 500 kr., er tilskotið: 1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 500 kr. og upp til 1.000 kr., 2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.000 kr. og upp til 2.000 kr., 3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.000 kr. og upp til 5.300 kr. 4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 5.300 kr.	**1.** 18 verður orðað soleiðis: "§ 18. Støddin á tilskotum er ásett eftir tilskotsprísunum sambært § 21 til heilivág o.a., sum veittur verður sambært §§ 13-16, og sum viðkomandi persónur hevur keypt innan fyri eitt ár frá fyrsta keypi. Eitt nýtt tíðarskeið byrjar, tá viðkomandi persónur aftur keypir tilskotsheimilaðan heilivág, eftir at gamla tíðarskeiðið er farið. *Stk. 2.* Fyri persónar í aldrinum 18 ár og til pensjónsaldur verður onki tilskot veitt, um útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár eru undir 1.000 kr. *Stk. 3.* Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 1.000 kr., er tilskotið: 1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.000 kr. og upp til 2.500 kr. 2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.500 kr. og upp til 4.500 kr. 3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 4.500 kr. og upp til 8.000 kr.

5) 100% av tí partinum, sum fer upp um 2.380 kr. fyri fyritíðarpensjónistar og persónar, sum eru fyltir 67 ár. *Stk. 4.* [2)] [3)] Børn og ung, yngri enn 18 ár, gjalda ikki egingjald. *Stk. 5.* [3)] [7)] Um ein persónur fyllir 18 ella 67 ár, ella gerst fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar. *Stk. 6.* [3)] 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2 og 3 prístalsviðgjørdar í kunngerð.	4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 8.000 kr. *Stk. 4.* Fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar verður onki tilskot veitt, um útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár eru undir 600 kr. *Stk. 5.* Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 600 kr., er tilskotið: 1) 30% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 600 kr. og upp til 2.800 kr. 2) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.800 kr. og upp til 3.100 kr. 3) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 3.100 kr. *Stk. 6.* Børn og ung, yngri enn 18 ár, gjalda ikki egingjald. *Stk. 7.* Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar. *Stk. 8.* Um ein persónur verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 4 og 5. *Stk. 9.* 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2 - 5 prístalsviðgjørdar í kunngerð.
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.